átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

**Týðiligur kristindómur**

„Men Stefan, gjørdi, fullur av náði og kraft, undur og stór tekin millum fólkið"

**Ápostlasøgan 6, 8 og 8, 1**

Stefan er ein av sjónligastu kristnu persónmenskum, sum í heila tikið er lýst í Nýggja Testamenti. Tá ið Halgabók skal geva eina mynd av honum, brúkar hon útsagnir sum, at hann var ein maður, fyltur av trúgv og heilagum anda, og fullur av náði og kraft. Hansara kristindómur var ein veruleiki, ið fylti hann heilt, og kristna eyðkenni hansara var millum annað trúgv og andi, náði og kraft.

Slíkur persónur talar til okkara um týðiligan kristindóm. Og í øllum tí nógva og fløkta átrúnaðinum, sum vit síggja í dag - hvar markið millum kristiligt og verðsligt gerst tokutari og tokutari, tí menniskju duga ikki at síggja hvat er verðsligt og hvat er andaligt - kann sigast, at tað júst er ein slíkan mann, vit treingja at setast andlit til andlits við. Alt tað verðsliga og hálvkristiliga roynir at viska burtur markið og lokka hjørtuni inn í ein vandamiklan heilaspuna.

Søgan um Stefan fyllir ikki nógv, men tað er sonn dygd í henni. Hon sigur fyri tað fyrsta, at greiður kristindómur skapar árin og andaligan førleika.

Fyri tað næsta, so vekir týðiligur kristindómur mótsagnir. Stefan var nógv elskaður, men eisini nógv hataður.

Fyri tað triðja, so skapar týðiligur kristindómur sanna og týðiliga veking.

Og fyri tað fjórða, so gevur týðiligur kristindómur fullan sigur í deyðanum.

Alt hetta kanst tú lesa í søguni um Stefan í Ápostlasøguni

Gævi vit kundu prædika soleiðis, at kristindómurin gjørdist týðiligari og greiðari, so einki var at fara skeivur av, tá ið menniskju lurta eftir orðinum. Amen!

# 44 prosent trúgva á Gud



*Bólkurin av teimum trúgvandi í Noregi er í minking*

**Nýggj norsk kanning vísir, at 44 prosent av norðmonnum trúgva á Gud, meðan 57 prosent eru annaðhvørt í iva ella trúgva als ikki á Gud**

**Noreg:** Bólkurin av teimum ið siga seg ivast og teimum sum siga seg vera ikki-trúgvandi, er so líðandi vorðin eins stórur – ávikavist 29 og 27 prosent.

Hetta vísir kanningin, har tey 1000 spurdu skuldu svara eina spurninginum: "Trýrt tú ella trýrt tú ikki á Gud, ella ert tú í iva?"

Samstundis vísti kanningin, at tað bert eru 34 prosent av teimum spurdu sum trúgva uppá eitt lív eftir deyðan, meðan 38 prosent trúgva ikki uppá eitt lív hinumegin deyða og grøv. 28 prosent siga seg ivast.

Páskaboðskapin, sum sigur at Jesus reis upp frá deyða, trúgva bert 30 prosent uppá, vísir kanningin sum Respons hevur gjørt fyri norska blaðið Aftenposten. 38 prosent siga, at tey ikki trúgva hesi hending.

- Tað er ein gongd sum sæst í Vesturheiminum har parturin av teimum religiøsu minkar. Bólkurin av teimum sum trúgva eitt lítið sindur veksur nakað, meðan bólkurin av teimum sum trúgva er minkandi, sigur granskingarleiðarin Hans Stifoss-Hansen í Stiftelsen Kirkeforskning.

Sambært Stifoss-Hansen brúka mong menniskju tey kristnu ritualini, men siga seg kortini ivast í kristindóminum ella trúgva bert eitt lítið sindur.

# Saudi-Arabien fær katólska kirkju

**Abdullah kongur í Saudi-Arabien stuðlar ætlanini at byggja ta fyrstu katólsku kirkjuna í muslimska heimlandi sínum.**

**Saudi-Arabien:** Umboð fyri Vatikanið eru í hesum døgum í samráðingum við stjórnina í Saudi-Arabien um loyvi at byggja hesa kirkjuna í landinum, har slíkt áður hevði verið púra óhugsandi.

Stjórnin hevur higartil ikki vilja givið loyvi til ikki-muslimsk trúarsamfeløg at byggja sær samkomuhús ella alment at lýsa við trúgv síni, eins og tað er bannað at eiga bíbliur, krossar og rósukransar, skrivar cnews.com.

Hóast hetta hevur Abdullah kongur nú givið loyvi til, at ein katólsk kirkja kann byggjast í landinum. Hetta verður ein "søgulig hending" og eitt týdningarmikið fet ímóti størri samskifti millum átrúnaðirnar, sigur talsmaðurin hjá pávanum, Faðir Federico Lombardi.

Í Saudi-Arabien búgva einir 800.000 katolikkar, og er hetta landið tað einasta í arabisku hálvoynni, har eingin kirkja higartil er bygd.



*Arabisku londini hava higartil ikki verið so fegin um fremmandan átrúnað. Nú er kortini broyting áveg*

## Ynskið frá pávanum

Saudi-Arabien hevur enn ikki alment diplomatiskt samband við katólsku kirkjuna, men í november mánaði í fjør varð Abdullah kongur tann fyrsti saudi-arabiski kongurin sum vitjaði Vatikanið.

Undir vitjanini tosaði Benedikt XVI pávi íðin fyri at fáa loyvi at byggja eina kirkju í landinum. Nú er líkt til at hetta fer at geva úrslit.

Diplomatar í Vatikaninum hava leingi tosað um, at tey muslimsku londini áttu at givið frælsi til kristnar minnilutabólkar at útinna átrúnað sín, eins og kristin lond í Europa viðurkenna sama rætt hjá muslimum.

Rom hevur til dømis givið loyvi til byggingina av størstu moske-'ini í Europa.

Stuðulin frá Abdullah kongi kemur júst um sama mundið sum oljulandið Qatar í farna mánaði vígdi fyrstu katólsku kirkjuna, sum skal tæna teimum 150.000 gestaarbeiðarunum í landinum.

Kirkjan, ið verður mett sum eitt symbol uppá samstarvið millum ein muslimskan stat og Vatikanið, varð latin av emirinum í Qatar, Hamad Bin Khalifa al-Thani.

Katólski ovastin í Kuwait, Qatar, Yemen og Sameindu Arabisku Emiratini, erkabiskupurin Paul-Mounged El-Hachem, hevur staðið fyri samráðingunum um eina kirkju í Saudi-Arabien.

## 60.000 krónur til missión

**Strendur:** Árligi basarurin hjá barnaringinum í missiónshúsinum á Strondum (myndin) gav í ár næstan 60.000 krónur, sum fara óskerdar til arbeiði í heidnum londum. Hvønn týsdag veturin ígjøgnum hittast børnini, sum í mestan mun eru gentur, í missiónshúsinum á Strondum at evna ting, sum um várið verða seld á basarinum. Aftur í ár var nógv vakurt evnað og latið til basarin. Sum vanligt sang barnakórið og ein andakt varð hildin áðrenn hjólið varð sett í gongd.

Tað gekk óføra væl at selja seðlarnar, og tá avtornaði høvdu tey savnað næstan 60.000 krónur, sum fara til missiónsarbeiði í heidnum londum



## Hittast til ársmøti

**Havn:** Ársmøtið hjá Heimamissiónini byrjaði hóskvøldið og heldur fram alt vikuskiftið. Seinastu nógvu árini hevur Ársmøtið verið hildið í Leguhúsinum í Nesvík, men í ár verður tað í Meinigheitshúsinum og í Vesturkirkjuni í Havn. – Vit hava valt at flyta Ársmøtið til Havnar, millum annað fyri at gerast sjónligari í høvuðsstaðnum og millum føroyingar sum heild, sigur Vagn Foldbo, aðalskrivari hjá Heimamissiónini. Í Nesvík hevur ein tann trupulleikan, at hølini ikki eru nóg stór til kvøldmøtini, tá ið tað ofta hevur verið sera trongligt. - Við at hava Ársmøtið í Havn, kunnu vit rúma nógv fleiri fólkum, sigur Vagn. Ársmøtið byrjaði í Meinigheitshúsinum, men frá leygarkvøldinum vera tiltøkini í Vesturkirkjuni.

## Enn ein sunnudagsskúli í kirkjutíð

**Hoyvík:** Tá klokkan ringir til gudstænastu sunnudagin í Hoyvíkar kirkju, verður tað ein serstøk gudstænasta í tveimum førum: Í fyrsta lagi, tí at hetta verður fyrstu ferð at nýggi presturin Ann Dahl Hansen skal prædika. Í øðrum lagi verður hetta fyrstu ferð at sunnudagsskúli verður hildin í kirkjuni. Kirkjuráðið hevur í eina tíð arbeitt við hesi ætlanini, og nú verður ætlanin so sett í verk. Skipanin verður tann, at børnini fara niður í kirkjukjallarin undan prædiku og verða heintað av foreldrunum aftur eftir gudstænastuna. Í øðrum kirkjum hevur ein sæð, at talið av kirkjugangarum er økt munandi eftir at sunnudagsskúlin er byrjaður.